## Dómur til hítu-kartel



Brúkarar kring allan heim hava eftir øllum at døma rindað á leið 10% ov nógv fyri hítir og aðrar gummivørur í tíðarskeiðinum 1993 til 2002. Mikudagin feldi ES-ráðið dóm yvir fleiri chloropren-framleiðarar, tí hesir høvdu framt kartel-virksemi, sum hevði við sær alt ov høgar brúkaraprísir. Bótin til framleiðaranar var 1,8 mia kr.

## Lesiringur á Fuglafjarðar bókasavni

Aftur í vetur fer Fuglafjarðar bókasavn í holt við at stovna ein lesiring, har fólk hittast eina ferð um mánaðin at tosa um eina bók. Síðani verður í felag tikin avgerð um hvør bók skal lesast til næstu ferð. Ætlanin er at lesiringurin savnast fyrsta mikukvøld í hvørjum mánaði. Lesiringurin savnast fyrstu ferð í vetur mikukvøldið tann 9. januar 2008 kl. 20:00, har vit fara at tosa um bókina “Færøblues – drengen med celleoen” eftir Lisbeth Nebelong, ið var og vitjaði í Føroyum fyri stuttum.

# dir at heilavaska børn



*- Gylta Kumpassin er ein stórsligin filmur, sum hevur lætt spæl við at ávirka átrúnaðin hjá børnunum. Børn klára als ikki at standa ímóti slíkum filmi, sum førur tey aftur í reinan heiðinskap, sigur kunningarleiðarin hjá katólsku kirkjuni í Danmark. Føroyskur serfrøðingur heldur, at børn hava góð filtur til at hyggja eftir filmum og at spæla telduspøl*

koma í biografarnar beint undan jólum, sigur hon.

### Foreldur mugu vísa ábyrgd

Iben Tranholm heldur, at foreldur eiga at vísa ábyrgd mótvegis sínum børnum, tá ið tað kemur til filmar og undirhald.

- Foreldur lata ofta børnini ráða sær sjálvum, og børnini sleppa at síggja teir filmar og spæla tey telduspøl, sum tey hava hug til, men tað ber ikki til. Foreldur mugu vísa ábyrgd mótvegis børnunum, sigur hon.

– Vit tosa nógv um økologiskan mat og reint umhvørvi, men tá ið tað kemur til sálina hjá børnunum, so letur alt seg gera. Tá verður sagt, at tað er bara undirhald ella eitt spæl, men hesir anti-kristnu filmar og spøl eru við til at mynda persónligheitina hjá børnunum.

– Tað er einki filtur nakrastaðni, og tí hava tær myrku kreftirnar frítt spæl við okkara børnum og ungu, heldur Iben Tranholm.

Hvørji ráð gevur tú foreldrunum viðvíkjandi filminum Gylta Kumpassin?

- Eg ætli mær ikki at lata míni børn síggja filmin, og eg vil mæla foreldrum frá at lata børnini síggja filmin einsamøll. Antin mugu foreldrini nokta børnunum at hyggja eftir filminum ella mugu tey verða við og tosa við børnini eftir filmin. Gylta Kumpassin er ein filmur við eini missión at undirgrava kristindómin, og tað verður gjørt við flottum undirhaldi, sum børnini og tey ungu ikki klára at standa ímóti.

### Børnini duga at standa ímóti

Birgir Kruse, sum ummælir filmar fyri Kringvarpið og hevur granskað í talgildum samskifti hjá børnum, sær onga orsøk til at stúra fyri, at børn fáa skaða av at hyggja eftir filmum og spæla telduspøl, ið seta nýggj mørk og í mangar mátar spæla við tilveruligar spurningar.

– Men sjálvandi skulu foreldur vísa ábyrgd. Men tað gera tey ikki við at seta forboð. Bókadeildin hjá Lærarafelagnum hevur longu sett hesa søgu í umfar, og nú er fyrsti filmurin at síggja í Havnar Bio. Tað er fínt, tí so kunnu vit við egnum optikki fylgja við, sigur hann.

– Men eg eri ikki samdur við Iben Tranholm, tá hon sigur at børn einki filtur hava. Tvørturímóti meti eg, at børn hava so góð filtur og eru so fjølmiðlavand, og tað á fleiri pallum í senn, at hvørki skúli ella foreldur skilja tey og enn minni brýggja seg um at lofta og viðgera henda førleika.

– Millum annað av hesari orsøk er so illa statt við lesingini í skúlunum. Vit møta ikki børnunum, har tey eru, og serliga á hesum øki ørkymlar tað meg, at vit ikki so mikið sum gera eina roynd, almenna ella privata, at skilja børnini og teirra fascinatión av spennandi søgum í biografum og á teldu, sigur Birgir Kruse.

### Brúka filmarnar

Britt Istoft, sum er religiónssøgufrøðingur við Syddansk Universitet, er ikki ovfarin av pástandunum um filmin Gylta Kumpassin og aðrar filmar.

– Her verður spælt upp á somu streingir, sum tá ið fólk brendu Harry Potter-bøkur, og Dan Brown (hann skrivaði Da Vinci Code, blaðm.) varð lagdur undir hatur, sigur hon við Kristeligt Dagblad.

– Børnini fara at uppliva Gylta Kumpassin sum eina søgu um hetjur, men tað eru nógvar tilvísingar í filminum til Bíbliuna og skaldskap. Eg rokni ikki við, at Gylta Kumpassin fer at skapa nakað kjak millum breiðu fjøldina av dønum, heldur Britt Istoft.

Formaðurin fyri Evangelisk Luthersk Netværk í Danmark heldur, at børn liva í einum átrúnaðarligum tómrúmi, og tí kunnu tey verða løtt at taka okkulta heimin úr ævintýrfilmunum til sín.

– Men hinvegin er tað eisini gott, at filmar og annað undirhald skapa kjak um átrúnað. Tí skulu vit sum kirkja ikki fara út við peikifingrum á lofti, men heldur síggja møguleikan í at brúka hesar filmar til nakað, sigur Henrik Højlund, sum er teologur og sóknarprestur, við Kristeligt Dagblad.

## Umstríddar bøkur

Filmurin Gylta Kumpassin byggir á skaldsøguna Norðlýsi, ið er fyrsti partur í virðislønta tríverkinum Myrkursins Frumevni. Tað er Philip Pulman, sum hevur skrivað bøkurnar.

Bókarøðin hevur verið umstrídd í millum annað Onglandi og USA, tí kristnir felagsskapir hava lagt Pullman undir at hava eina beinleiðis antikristna dagskrá við bókunum, og í einari samrøðu við Washington Post í 2001 er Pulman endurgivin fyri at siga:

– Eg royni at máa grundarlagið undan kristnu trúnnu.

Í somu samrøðu sigur Pullmann, at um hansara skaldskapur verður umstríddur, so kann tað hava størri sølu við sær.

- Men eg royni ikki bara at fornerma fólk. Eg haldi, at bøkurnar innihalda nøkur virði, sum eru týdningarmikil fyri meg, sigur Pullmann í samrøðuni við Washington Post.

## Pullman á føroyskum



Bókarøðin His Dark Materials hjá Philip Pulman hevur fingið heitið Myrkursins Frumevni á føroyskum, og allar tríggjar bøkurnar í røðini eru týddar til føroyskt og givnar út av Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Bøkurnar eita Norðlýsi, Tann Tvíeggjaði Knívurin og Ravkikarin, og bøkurnar komu út í 2004 og 2005.

Tað er Hjalmar P. Petersen, sum hevur týtt bøkurnar til føroyskt.